# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ÍBÚÐARBYGGING OMAN MATTALÁG

Felagið Bústaðir, fyrrverandi Húsalánsgrunnurin, hevur ætlanir um at byggja leiguíbúðir ymsastaðni í landinum, harímillum á matr. nr. 897e 897k, 897h og 897i oman Mattalág í Tórshavn.

Í Tórshavn eru í dag alt ov fáar leiguíbúðir og tí er tað av stórum týdningi fyri býin, at fleiri leiguíbúðir verða bygdar í býnum.

Í almennu byggisamtyktini eru ognirnar matr. nr. 897e, 897k og 897h, oman Mattalág, broyttar frá A1-øki til A3-øki, soleiðis at íbúðir kunnu byggjast á økinum.

Ætlanin er at byggja 34 íbúðir í einari og tveimum hæddum og eitt felagshús á økinum matr. nr. 897e og 897k - tilsamans uml. 1.140 $m^2$ grundvídd. Samlaða víddin á hesum ognunum er uml. 6.460 $m^2$.

Talið av parkeringsplássum er tilsamans 53, sum liggja út ímóti innkoyringar vegunum til ognina – 28 pláss ímóti Jákup Nolsøs gøtu og 25 ímóti Mattalágvegnum. Inni á økinum eru bert gongugøtur frá p-plássum til íbúðir. Harafturat verða 10 parkeringspláss samlaði inni á verandi ognunum 897h og 897i við innkoyring frá Íslandsvegnum.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til íbúðarbygging.

1.2 at tryggja, at staðsetingin og tal av íbúðum verður sum sýnt í kortskjali 2.

1.3 at skipa tilkoyring og parkeringspláss til økið.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1 og fevnir um matr. nr. 897e 897k, 897h og 897i, Tórshavn

2.3 Økið er uml. uml. 7.750 m2 til støddar og liggur í A3-øki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.4 Sambært kap. IV §7 í almennu byggisamtyktini, er A3-øki í 3. grundumráði lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava

handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tilíkt

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Á økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, kunnu, umframt verandi hús, byggjast 34 íbúðareindir í ymiskum sniðum og støddum og eitt felagshús og parkeringspláss til tilsamans 63 bilar sambært kortskjali 2.

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Bygging av tilsamans 34 íbúðareindum á tilsamans 1.140 $m^2$.

4.2 Bygging av felagshúsi á í mesta lagi 140 $m^2$.

## § 5. VEGIR OG PARKERINGSPLÁSS

5.1 Koyrivegir eru bert inn á parkeringspláss.

5.2 Frá parkeringsplássum til íbúðir skulu bert verða gongugøtur.

5.3 Parkeringspláss skulu gerast til tilsamans 63 bilar. 28 pláss ímóti Jákup Nolsøs gøtu, 25 ímóti Mattalágvegnum og 10 ímóti Íslandsvegnum.

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

7.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

8.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

8.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 13/00904 |
| Góðkent: | 20/1 - 2014 |
| Dagfesting: | 20/1 - 2014 |
| Váttað: | [signature] |




| INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 13/00904 |
| Góðkent: | 20/1-2014 |
| Dagfesting: | 20/1-2014 |
| Váttað: | K Poulsen |

## Tórshavnar Kommuna
**Byggi- og býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti:** | Íbúðarbygging oman Mattalág | | | | |
| **Viðmerking:** | Skipan av økinum | | | | |
| **Skjal nummar:** | 2. | **Journal nr:** | 2013-1838 | | |
| **Dagur:** | 03.09.2013 | **Mát:** | | **Tekna:** | KF/MKJ |
| **Rættað:** | | | | | |




## Tórshavnar Kommuna
**Byggi- og býarskipanardeildin**

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Heiti:** | Íbúðarbygging oman Mattalág | | |
| **Viðmerking:** | Yvirlitskort | | |
| **Skjal nummar:** | 1 | **Journal nr:** | 2013-1838 |
| **Dagur:** 23.07.2013 | **Mát:** | **Tekna:** | KF/MKJ |
| **Rættað:** | | | |

FISKIMÁLARÁÐIÐ

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

**Stjórnarskrivstovan**
20. januar 2014
Mál: 13/00904-8
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: EA/KHP

Tygara skriv: 2013-1838/12 SG

**Viðvíkjandi nýggjari serstakari byggisamtykt fyri íbúðarbygging oman Mattalág**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18 mars 20013, hevur Tórshavnar kommuna við skrivi, dagfest 21. november 2013, sent Fiskimálaráðnum uppskot til nýggja serstaka byggisamtykt fyri íbúðarbygging oman Mattalág til góðkenningar.

Serstaka byggisamtyktin snýr seg um at skipa íbúðarbygging á ognunum matr. nr. 897e, 897i, 897k og 897h, Tórshavn

Sagt verður frá, at Fiskimálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktina fyri íbúðarbygging oman Mattalág.

Víst verður eisini til ætlanarskrivið frá Fiskimálaráðnum, dagfest 7. januar 2014.

Hjálagt kortskjal og byggisamtyktartekstur fyri serstøku byggisamtyktini fyri íbúðarbygging oman Mattalág, við átekning frá Fiskimálaráðnum.

Vinarlig heilsan

Elinborg Apol
løgfrøðingur

Ministry of Fisheries
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Faroe Islands
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo